90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Rógvi Nybo

# SÓLRÚN MICHELSEN




FAKTA **SÓLRÚN MICHELSEN**

**Fødd:** 11. mars1948
**Bústaður:** Gundadalsvegur 19
**Starv:** Rithøvundur
**Familja:** Gift við Poul Michelsen, eigi trý børn og átta ommubørn

# Eg livi mín **dreym**

## Hvat er tað besta við at starvast sum rithøvundur?

At sleppa at ferðast í hugaheiminum

**Hvat er tað ringasta?**
Tú verður ov avbyrgd, einsamøll

**Hvat elskar tú við Føroyum?**
Alt!! Sjálvt hitt neiliga.

**Hvat hatar tú við Føroyum?**
Einki, men skal nakað nevnast, hevði eg ynskt færri myrkar dagar.

**Hvat er títt motto?**
Tað man fara at ganga

**Hvat er tín størsti brølari?**
Tað eg fyrr metti sum brølarar, kann eg flenna at í dag. Tað er fyrimunurin við at gerast vaksin.

**Hvat er tað besta, tú hevur gjørt?**
Slept tí fyrsta handritinum

**Hvør dreymur skal førast út í lívið í nærmastu framtíð?**
Eg livi hann beint nú.

**Hvat óttast tú?**
At nakað skal henda mínum kæru.

**Hvar stendur tú átrúnaðarliga?**
Gamaldags kirkjufólk

**Hvat er eitt gott lív?**
At tú hevur gott samskifti við tíni kæru og við fólk annars og eina góða heilsu

**Hvør er tín fyrimynd?**
Havi onga sum so. Haldi, at flest øll mennisku eru so serstøk, at tú kanst síggja okkurt at líta upp til hjá hvørjum einstøkum.

**Hvat hevur verið besta tíðarskeið í lívi tínum?**
Beint nú

**Hvør hending hevur havt størstan týdning fyri teg?**
Uttan samanbering at fáa børn og ommubørn

**Hvat hevur verið tað ringasta?**
At missa ein, tú vart góð við

**Hvat hevur lívið lært teg?**
At taka ein dag í senn

**Hvat hevði tú gjørt, um tú var ósjónlig/ur eina viku?**
Kløkka fólk og haft tað ordiliga stuttligt

**Hvat er títt besta ráð til Løgmann?**
Savna tropparnar og fá tey at semjast um at vera góð við hetta deiliga landið uppá tann rætta mátan.

**Um tú slapp at liva lívið umaftur, hvat hevði tú gjørt?**
Avgjørt fingið mær eina góða útbúgving.